Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Jóhannis Joensen, løgtingsmaður

Svarari: Ingilín D. Strøm, landsstýrismaður í umhvørvismálum

Evni: Heimildir til kommunur á bústaðarøkinum

Spurningar:

1. Kann landsstýrismaðurin upplýsa, nær uppskot verður lagt fyri Løgtingið, sum heimilar kommunum at stovna, byggja og reka almannagagnlig bústaðarfeløg fyri at fáa fleiri bústaðir kring alt landið?

2. Kann landsstýrismaðurin upplýsa, nær uppskot verður lagt fyri Løgtingið, sum heimilar kommunum at áseta gjøld fyri tænastuveitingar til húsaeigarar, sum ikki búgva í kommununi?

Viðmerkingar:
Í samgonguskjalinum eru nevnd fleiri góð átøk, sum skulu gerast á bústaðarøkinum við tí endamáli at nøkta stóra bústaðartørvin og minka talið av tómum bústøðum kring landið.

Fleiri av átøkunum leggja upp til at geva kommununum fleiri heimildir, og til hetta krevjast eisini lógarbroytingar.

Fyri at fáa at vita nær uppskot til lógarbroytingar verða løgd fyri Løgtingið, verða hesir spurningar settir.

Á Løgtingi, 19. mai 2023

Jóhannis Joensen